gult cyan magenta svart



Neistin-Sóljan 21-12 (13-6)

# Avgreiðsluspurningur

**Neistakvinnunum nýttust als ikki at spíla seg út til tess at tryggja sær væntaða sigurin á Sóljuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at taka seg aftur í, at Neistakvinnurnar vóru stórfavorittar at vinna dystin móti Sóljuni, sum varð leiktur í Ítróttahøllini á Hálsi í Havn sunnudagin.

Oddalið er Neistin ikki í ár, men hinvegin hava uppflytararnir úr Sóljuni alla tíðina hildið til í botninum av stigatalvuni, og síðani Simona Dziugyte gjørdi av at fara til Klaksvíkar, eru sannlíkindini fyri sigrum so avgjørt ikki vorðin størri.

### Eingin spenningur

Tað var eisini rættiliga skjótt greitt, at tað skuldi verða Neistin, sum fór avstað við stigunum sunnudagin.

Sóljan fekk fyrsta málið, og tær sluppu eisini at brenna eitt brotskast, áðrenn Neistin byrjaði, men eftir hetta var ongantíð samband aftur millum liðini. Ístaðin øktu neistakvinnurnar javnt og samt um leiðsluna, og tá avtormaði, høvdu tær ognað sær ein hampuliga tryggan sigur.

### Løgdu lítið í dystin

Liðskipari á Neistaliðnum er Súna Mørk, og hon helt ikki, at talan hevði verið um tað stóra upplivilsi fyri áskoðararnar.

– Nei. Har var sum so lítið at skriva heim um. Ferðin á dystinum var alla tíðna lág, og yvirhøvur tóktust spælararnir ikki at leggja so nógv í dystin. Nógvir málmøguleikar vórðu misnýttir, og tað skulu so heilt aðrir bollar á suppuna, um vit skulu gera nakað sum helst við VÍF mikudagin, segði Súna um dystin.

Sum nevnt, so skal Neistin mikukvøldið hitta VÍF kvinnurnar, og tað er púra vist, at liðskiparin hevur rætt í, at talan tá verður um eina torføra uppgávu. Enn hava tær úr Vestmanna so ikki roynt at tapt, og spurningurin er helst, um nakað av hinum liðnum fer at skala tær hetta kappingarárið.

Fyri Sóljuna var tapið enn eitt í longu røðini, sum hevur staðið við, og burtur sæð frá uppgerðunum móti Tjaldri, hevur tað heldur ikki eydnast vágagentunum at fáa stig. Tað er allar helst eisini í júst teimum báðum dystunum, sum tær enn eiga eftir móti runavíkingunum, at Sóljan skal gera sær nakrar vónir um stig, soleiðis at tilveran í besta deildini kann tryggjast eitt ár afturat.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Neistin: Súna Mørk 7(1), Birita Wardum 4, Katrin á Neystabø 4, Annika Thomsen 4(1), Bjørg Patursson 2
Sóljan: Marjun Jørgensen 5(5), Heidi Maria Akselsen 3, Elspa Egilstoft 1, Hertha Simonsen 1, Jóhanna í Horni 1, Fía Selma Nielsen 1
Brotskøst: Neistin 5, Sóljan 7
Útvísingar: Sóljan 5
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Justinus Justinussen



*Sóljan megnaði ikki at fáa stig við sær úr Havnini, men ivaleyst verða tað í uppgerðunum móti Tjaldri, at vónirnar um hetta skulu setast*

*savnsmynd*

Stjørnan-Kyndil 30-24 (13-16)

# Stjørnan mundi snávað




*Kyndilskvinnurnar eru nú so smátt um at verða fullmannaðar, og hetta fer uttan iva eisini at síggjast aftur í betraðum úrslitum*

*savnsmynd*

**Í hálvan tíma høvdu kyndilskvinnurnar Stjørnuna á knøunum, men fyrstu løtuna av seinna hálvleiki setti Stjørnan alt upp á pláss**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá Kyndil í fjør vitjaði í Klaksvík, var gullrómurin øgiligur. Stjørnan kundi tá við einum sigri taka eitt risafet móti gullmerkjunum, sum felagið ikki hevði vunnið í fjórðings øld, og sigurssælan var stór, tá gullið eftir dystin var at kalla tryggjað.

Sunnudagin hittust liðini aftur, men hesa ferð vóru fortreytirnar heldur øðrvísi. Stjørnan hevði framvegis tørv á einum sigri, men nú var hesin alneyðugur, til tess at halda fast um silvurplássið, eftir at kvinnurnar hjá VÍF mest sum hava tryggjað sær gullmerkini.

Harumframt mundi tað eisini hava alstóran sálarligan týdning fyri klaksvíksgenturnar at fáa ein sigur, nú

### Gestirnir bragdliga byrjan

Tá dysturin byrjaði, skuldi ein tó ikki hildið, at tað var Stjørnan, sum hevði mest at stríðast fyri í dystinum. Kyndil fór beinan vegin at gera um seg, tað var eisini skjótt, at tær høvdu vunnið seg nøkur mál framum.

Kyndil var annars fyri fyrstu ferð í langa tíð í nøkrum, sum líktist sterkastu uppstillingini, og ivaleyst hevur hetta eisini gjørt sítt til, at tær veruliga roknaðu við, at tær kundu taka stig frá verandi meistarunum.

Allar hesar vónir vórðu tó gjørdar til einkis fyrstu løtuna av seinna hálvleiki. Tá fór Stjørnan frá 13-16 upp á 19-18, og hóast Kyndil eina løtu eftir hetta fylgdi við, so fingu tær ongan tíð rættiligt samband við Stjørnuna aftur.

### Tóku seg saman

Toppskjútti hjá Stjørnuni hendan dagin var Anna Kristina Samson, og eftir dystin duldi hon ikki fyri, at hon var fegin um sigurin.

– Hatta var ein ótrúliga góður sigur fyri okkum. Eisini tí vit megnaðu at reisa okkum so væl. Ta einu løtunaí fyrra hálvleiki vóru vit eini seks mál aftanfyri, og tá mann megnar at vinna hetta aftur, so eri sjálvsagt nøgd.

– Eg haldi tó, at vit áður hava víst, at vit hava viljan til at stríðast allan dystin. Fleiri ferður fyrr í ár hava vit verið aftan fyri við fleiri málum, og so kortini megnað at fingið okkurt burtur úr dystinum.

Spurd, hvat tað var, sum gjørdi, at tær megnaðu at venda øllum á høvdið fyrstu løtuna eftir steðgin, svaraði Anna Kristina, at tær stutt og greitt tóku seg saman.

– Vit vórðu samdar um, at spæl okkara í fyrra hálvleiki so langt ífrá var nóg gott, og at vit hvør sum ein skuldu taka okkum saman, tá vit fóru út aftur til seinna hálvleik. Tá fingu vit eisini verjuna at rigga, soleiðis at Jórun Ludvig ikki slapp eins væl framat, og tá vit samstundis tóku Lotte Sørensen úr spælinum, varð álopsspælið hjá teimum bremsað rættiliga væl.

– Tá so verjan fæst at rigga, liggur sjálvandi betri fyri við skjótálopum, og alt í alt haldi eg, at vit spældu ein sera góðan seinna hálvleik, segði Anna Kristina um dystin.

### Fara eftir silvurmerkjunum

Um vónirnar fyri tað, sum eftir er av kappingarárinum, noyðist Anna Kristina meira ella minni at ásanna, at gullmerkini eru mist.

– Vit fáa so ikki gjørt nakað einsamallar fyri tað, og um ikki VB ella kanska onkur av hinum fær gjørt nakað við VÍF, so mugu vit ásanna, at vit ongan møguleika hava. Fyri fyrst fara vit so eftir silvurmerkjunum, og tey gera vit alt fyri at fáa komandi dystirnar, segði Anna Kristina Samson at enda.

Hóast tað sostatt heldur ikki eydnaðist Kyndli at vinna hendan dystin, so mundi avrikið tó geva eina greiða ábending um, at liðið aftur er um at finna røttu kósina. Leikarar, sum hava verið burtur frá, eru nú flest allar komnar við aftur, so ivaleyst verður tað heldur hugaligari fyri teirra viðkomandi at spæla, tað sum eftir er av kappingarárinum.

Hóast møguleikin fyri heiðursmerkjum er horvin, so kunnu tær um ikki annað nýta árið til at fáa nakað av sjálvsálitið aftur á liðið, soleiðis at liðið aftur komandi kappingarár kann verða við til at stríðast um heiðursmerki.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Anna Kristina Samson 11, Una Olsen 7, Simona Dziugyte 5, Sólvá Eystberg 3(2), Vesna Radovic 2, Annika Ljósstein 2
Kyndil: Lotte Sørensen 8(2), Jórun Ludvig 7, Erla H. Smith 3, Ann Hansen 2, Kristbjørg Petersen 2, Jensia Petersen 2
Brotskøst: Stjørnan 4, Kyndil 4
Útvísingar: Stjørnan 5, Kyndil 6
Dómarar úr Tjaldri: Trýgvi Mortensen og Svenn Olsen



KÍF-VÍF 28-34 (10-19)

# VÍF avgjørdu beinanvegin

**Fyrstu løtuna av dystinum skutu vestmenningar KÍF sundur og saman, og eftir hetta kom ongan tíð spenningur í aftur dystin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kollfirðingar hava rættiliga havt viðvind seinastu dystirnar. Burtur úr dystum móti Kyndli og Neistanum eru komin trý stig, so einki er at siga til, um hondbóltsvónirnar í Kollafirði eru betri nú, enn tær hava verið undanfarnu árini.

Sunnudagin væntaðu flestu viðhaldsfólkini tó, at viðgongdin fyri eina tíð skuldi steðga. Mótstøðan kom nevnliga úr Vestmanna hesaferð, og havandi í huga nærum óhugnaligu styrkina hjá vestmenningum hetta kappingarárið, mundu stigavónirnar ikki vera av teimum bestu sunnudagin.

### VÍF bumbaði

Tað skuldi eisini vísa seg at gerast meira enn torført hjá KÍF at nerta við vestmenningar hendan dagin. Eftir níggju minuttum stóð 1-9 á stigatalvuni, og so var longu greitt, hvønn veg stigini skuldu fara. Eina somikið stóra leiðslu eru vestmenningar ikki vanir við at tveita burtur, og tað hendi so heldur ikki.

Restina av dystinum hildu teir gulu eisini tørn, og hóast KÍF onkun tíð royndi at trýsta á, so kom sigurin hjá oddaliðnum ongan tíð í vanda. Tá munurin var minstur, skildu fýra mál partarnar, men tvey skjót mál seinastu løtuna syrgdu fyri, at sigurin eisini í tølum gjørdist sannførandi.

### Ongan møguleika

Tá vit eftir dystin spurdu liðskiparan hjá KÍF, Petur Martin Johansen, hvussu teir vóru nøgdir um dystin, var viðmerkingin heldur ikki meira enn tað, sum var væntandi eftir ein slíkan dyst.

– Vit fáa einki at hanga saman fyrstu løtuna, og gevur tú VÍF eina slíka leiðslu, so er tað altso torført at gera nakað sum helst.

– Eg haldi annars, at vit klára at pressa teir eitt sindur seinastu løtuna av fyrra hálvleiki, og eftir steðgin eri eg sum so væl nøgdur við tað, sum vit sýndu. Ikki minst spældi Eddie Joensen sera væl, tá hann kom á vøllin, men sum sagt, so hjálpir tað einki, tá mann fær eina somikið ringa byrjan, segði Petur Martin Johansen.

### Hugaligt

Tá vit síðani spurdu liðskiparan, hvussu hann var nøgdur við gongdina, sum hon hevur verið seinastu dystirnar hjá KÍF, var lagið heldur betri.

– Tað kunnu vit so avgjørt ikki vera illa nøgdir um. Eg vildi sjálvandi ynskt, at hetta hevði rigga eitt sindur fyrr, men hinvegin eru vónirnar til komandi kappingarárið nú sera góðar, um vit megna at halda fast við fólkið, sum vit hava í ár.

– Tað kann ikki annað enn vera hugaligt, tá vit nú síggja, at tað, sum vit hava roynt undir venjing eisini riggar á vøllinum, so at vit eru nøgdir, er einki at ivast í, sigur Petur Martin at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
KÍF: Iljan Topic 8(2), Eddie Joensen 7, Petur Martin Poulsen 4, Durica Tomic 4(1), Jákup Dam 3(1), Kristian Madsen 2
VÍF: Johnny Joensen 7, John Zachariasen 6, Sámal Joensen 5(1), Áki Olsen 5, Martin Hummeland 4, Agnar Joensen 3, Ingi Olsen 2(2), Harald Bjørgvin 1, Sjúrður Holm 1
Brotskøst: KÍF 7, VÍF 6
Útvísingar: KÍF 9, VÍF 5
Diskvalifikatión: KÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen og Hjalmer Petersen

*VÍF bumbaði kollfirðingar sundur og saman beint sum dysturin byrjaði, og eftir hetta komu stigini ongan tíð í vanda*

*savnsmynd*



Neistin-H71 28-27 (13-15)

# Hoyvíkingar iðraðu seg

**H71 átti allar trumfirnar til at avgera dystin móti Neistanum, men teir spældu ikki kortini rætt, og tí kundi Neistin at enda taka stikkið heim**



*Jacob Jónsson var sjúkur, og Neistin mátti tí vera sterka íslendingin fyri uttan í týdningarmikla dystinum móti H71*

*savnsmynd*

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað vóru tvey lið í kreppu, sum fóru á vøllin í Ítróttahøllini á Hálsi sunundagin. Hvørki hjá Neistanum ella hjá H71 hevur riggað nakað serligt seinastu tíðina, og fyri bæði var tað tí avgerandi, at okkurt fekst burtur úr í dystinum sunnudagin.

### Eingin Jacob

Umframt at Neistin hevur havt tað trupult seinastu tíðina, so var liðið eisini rættiliga skert undan hesi uppgávuni. Jacob Jónsson, sum í fleiri dystum hevur verið største álitið hjá liðnum, var sjúkur heima við hús, og tí skuldi Neistin klára seg uttan hansara hjálp í týdningarmikla dystinum.

Tað var skjótt greitt, at tað heldur skuldi vera stríðsvilji enn vakurt spæl, sum skuldi tryggja øðrum liðinum sigurin, og fyrstu longu løtuna gekk sera javnt á. Seinastu løtuna undan steðginum fekk H71 tó togað seg nakað burtur frá, og vóru teir tvey mál framman fyri, tá farið varð til hálvleiks.

Beinan vegin í seinna hálvleiki høvdu hoyvíkingarnir eisini møguleikan at økja enn meira um leiðsluna, men onkursvegna megnaðu teir at misnýta tvey brotskøst, og ístaðin var tað nú neistaliðið, sum tók alt meira yvir.

Teir bláu vunnu seg eisini fram um hoyvíkingarnar, og tá best stóð til hjá teimum, var munurin niður upp á trý mál. Hoyvíkingar megnaðu tó enn einaferð at svara aftur, og fáar minuttir fyri leiklok eydnaðist teimum aftur at fáa leiðsluna. Neistin svaraði enn einaferð aftur, og komu framum, men tá var líkt til, at H71 fekk ein avgerandi fyrimun. Tað eydnaðist tó ikki við seks móti fimm – seinni við fimm móti fýra – at skora hjá hoyvíkingunum, og fegnir kundu neistamenninr ásanna, at teir høvdu fingið tvey stig burturúr, tá dómararnir høvdu floytað fyri seinastu ferð.

### Vónbrotin

Eftir dystin var tað ein vónbrotin liðskipari hjá H71, sum vit fingu orðið á.

– Eg haldi so avgjørt, at eg tosi fyri allar, tá eg sigi okkum vera ótrúliga vónsviknar um, at tað ikki eydnaðist okkum at vinna dystin. Vit hava allar møguleikar, og ikki minst, tá vit brenna hasi brotskøstini tíðliga í seinna hálvleiki. Høvdu vit økt upp í fimm mál tá, soleiðis sum møguleikin var til, ivist eg ikki í, at teir høvdu knekkað. Ístaðin sleppa teir inn aftur í dystin, og fara fram um okkum. Vit megna tó eisini at koma aftur, men seinastu løtuna skulu vit gera okkum dælt av yvirtalinum, men tað gekk so heldur ikki, sigur ein dapur Halgir Dahl Olesen.

Tá sæð verður burtur frá sjálvum úrslitinum, so helt Halgir tó, at onkur ljóspunkt vóru í dystinum.

– Í mun til seinast, eru vit nógv betri við, og allir leikararnir virkaðu eisini sera uppsettir í dag. Tað vísur seg bara ofta, at vit duga ikki at hava eina leiðslu, og tað hava vit so als ikki ráð til í einum slíkum dysti, sigur toppskjúttin í føroysku landskappingini at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Neistin: Ári Rouch 8(2), Áki Mørk 7(1), Kári Mortensen 4, Helgi Justinussen 3, Rune Møller 2, Ræni Slættanes 2, Karl O. Rasmussen
H71: Halgir Dahl Olesen 13(5), Johnny Durhuus 3, Hallur Danielsen 3, Rene Dahl Olesen 2, Anfinn N. Debes 2, Agnar Højgaard 2, Olaf Vestergaard 2
Brotskøst: Neistin 3, H71 7
Útvísingar: Neistin 4, H71 7
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Justinus Justinussen